# Yvirtøkan hjá P/f Magn av P/f Demich

Tilmæli frá Kappingareftirlitinum

22. august 2018

# Innihaldsyvirlit


1. SAMANDRÁTTUR ........ 2
1.1. Tilmæli ........ 2

2. MÁLSLÝSING ........ 3

2.1. Inngangur ........ 3

2.2. Partarnir ........ 3
2.2.1. P/f Magn ........ 3
2.2.2. P/f Demich ........ 4

2.3. Transaktiónin ........ 4

2.4. Fráboðanarskylda ........ 5

3. MARKNAÐARLÝSING ........ 6

4. METING ........ 7

4.1. Skilmarking av viðkomandi marknaði ........ 7
4.1.1. Viðkomandi vørumarknað ........ 8
4.1.2. Viðkomandi landafrøðiligi marknaður ........ 9
4.1.3. Ávegis niðurstøða ........ 9

4.2. Kappingarrættarlig meting ........ 9
4.2.1. Um samanleggingin ikki var framd ........ 10
4.2.2. Ávirkan á kappingina ........ 10
4.2.2.1. Møguleika at avbyrgja marknaðin ........ 11
4.2.2.2. Áhugin at avbyrgja marknaðin ........ 11
4.2.2.3. Ávirkan á kappingina ........ 12
4.2.2.3. Fyrimunir við yvirtøkuni ........ 12
4.2.3. Tilsøgn frá P/f Magn ........ 13
4.2.3. Ávegis niðurstøða ........ 15

5. ENDALIG NIÐURSTØÐA ........ 15

# 1. Samandráttur

1. Tann 3. apríl 2018 kom fráboðan frá Niels W. Poulsen, adv., um at P/f Magn hevði í umbúna at yvirtaka ræðið á P/f Demich.

2. Yvirtøkan er ein liður í ætlanini hjá P/f Magn um at gerast heildarveitari innan grøna orku. Umframt at yvirtaka P/f Demich hevur P/f Magn í umbúna at framleiða og selja streym til endabrúkarar.

3. Tann 11. mai 2018 boðaði Kappingareftirlitið fráboðara frá, at avgerð var tikin um at kanna yvirtøkuna nærri, sbrt. §17, stk. 1 í kappingarlógini.

4. Grundgevingin fyri at kanna yvirtøkuna nærri var, at P/f Magn hevur umleið 50% av teimum sum kundar, ið skulu skifta til grøna orku í næstum. Kappingareftirlitið vildi kanna, um P/f Magn hevði møguleika við hesi serligu støðu at avbyrgja kappingarneytar frá týðandi parti av viðkomandi marknaði.

5. Kappingareftirlitið staðfesti, at yvirtøkan kom at hava ávirkan á tríggjar marknaðir. Hesir vóru søla og uppseting av hitaskipanum, viðlíkahald av oljuriknum hitaskipanum og viðlíkahald av elriknum hitaskipanum.

6. Kappingareftirlitið kom til ta niðurstøðu, at P/f Magn hevði møguleika at avbyrgja kappingarneytar frá týðandi parti av marknaðinum.

7. Kappingareftirlitið kom somuleiðis fram til, at P/f Magn kundi hava áhugamál í at gera hetta, og at avleiðingin vildi verða at virkna kappingin varð munandi forða.

8. Kappingareftirlitið metti tí, at yvirtøkan ikki kundi góðkennast, og fingu partarnir boð um hetta í sambandi við, at tilmæli varð sent í hoyring tann 24. juli 2018.

9. Tann 10. august 2018 sendi P/f Magn eina tilsøgn um, at felagið vil geva seg undir at Kappingareftirlitið skal góðkenna um ávísar vørur og tænastur verða bundnar[1] ella buntaðar[2] saman. Somuleiðis vil P/f Magn geva seg undir at Kappingareftirlitið skal góðkenna sáttmálar har kundar verða bundnir í meir enn 1 ár.

## 1.1. Tilmæli

10. Kappingareftirlitið vil mæla Kappingarráðnum til, at góðkenna yvirtøkuni hjá P/f Magn av P/f Demich, sbrt. §15, stk. 2 í kappingarlógini, treyta av, at P/f Magn bindir seg til at halda ta tilsøgn, sum felagið gav Kappingareftirlitinum tann 10. august 2018.

---

[1] tying
[2] bundle

# 2. Málslýsing

## 2.1. Inngangur

12. Tann 3. apríl 2018 fekk Kappingareftirlitið eina fráboðan um, at P/f Magn hevði í umbúna at yvirtaka meirilutan av partapeninginum í P/f Demich. Fráboðanin var fullfíggjað tann 13. apríl 2018.

13. Tann 11. mai 2018 boðaði Kappingareftirlitið pørtunum frá, at avgerð var tikin um at kanna yvirtøkuna nærri, sbrt. §17, stk. 1 í kappingarlógini.

14. Grundgevingin fyri at neyðugt varð at kanna yvirtøkuna gjøllari var, at Kappingareftirlitið metti, at P/f Magn møguleika kundi avbyrgja kappingarneytar frá týðandi parti av marknaðinum, tí P/f Magn longu hevur kundasamband við 50% av teimum brúkarum, sum í næstum skulu skifta hitaskipan

15. Tær ætlanir, sum P/f Magn hevur lagt fram alment um framleiðslu og sølu av el, vilja geva felagnum enn betur møguleika at avbyrgja kappingarneytar frá áðurnevndu brúkarum.

16. Avgerðin um at kanna málið gjøllari hevur við sær, at tað er Kappingarráðið, sum tekur avgerð í málinum. Kappingarráðið skal sum meginregla innan 90 dagar eftir at boð, sbrt. §17, stk. 1, eru givin, hava tikið avgerð í málinum, sbrt. §17, stk. 2 í kappingarlógini.

17. Í sambandi við at P/f Magn lat inn tilsøgn, tá ið minni enn 20 yrkadagar vóru eftir av omanfyri nevndu freist, hevur Kappingareftirlitið boða pørtunum frá, at freistin verður longd við 20 yrkadøgum, sbrt. §17, stk. 3 í kappingarlógini.

## 2.2. Partarnir

### 2.2.1. P/f Magn

18. P/f Magn hevur havt virksemi í Føroyum undir ymiskum eigarum og vørumerki í meir enn 90 ár. Í byrjanini var felagið umboð fyri Dansk Shell í Føroyum, men seinni varð felagið umskipað til at vera deild í Dansk Shell.

19. Í 2007 varð felagið keypt av føroyskum felag, og navnið varð broytt til P/f Føroya Hedda. Sama ár varð P/f Føroya Hedda selt íslendskum felag.

20. Í dag eigur Skeljungur hf. 69,25% av partapeninginum í P/f Magn, meðan hini 30,75% er ogn hjá P/f Magn. Eigaraskarin í Skeljungur hf er rættuliga spjaddur. Størsti eigarin er Gildi-lífeyrissjóður (9,20%), hesin og 9 aðrir sita á 52% av partapeninginum. Hesir eiga hvør millum 7 og 3,5% av partapeninginum.

21. Høvuðsvirksemið hjá P/f Magn er innflutning, heilsøla og smásøla av gassolju, diesel og bensin. Á teimum marknaðum, sum eru innan hetta virksemi, er P/f Magn ein av tveimum veitarum. Á hesum marknaðum er marknaðarparturin hjá P/f Magn áleið 50%.

22. P/f Magn hevur eisini virksemi innan sølu, uppseting og viðlíkahald av oljufýringum. Her er felagið eisini ein av tveimum veitarum, og hevur ein marknaðarpart á áleið 50%.

23. At enda hevur P/f Magn virksemi innan sølu av dagligvørum, kioskvørum og bilvørum. Á hesum marknaðum eru fleiri veitarar.

24. Niðanfyri er yvirlit yvir fíggjarligu gongdina hjá P/f Magn seinastu árini.

| P/f Magn (tkr.) | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2012-2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bruttovinningur | 90.572 | 93.795 | 100.783 | 107.011 | 114.930 | |
| EBITDA | 45.236 | 49.080 | 50.368 | 53.897 | 53.901 | |
| Ársúrslit | 20.200 | 22.722 | 25.702 | 28.448 | 28.201 | |
| Ogn - Tilsamans | 328.241 | 310.557 | 286.725 | 298.800 | 319.951 | |
| Eginpeningur | 140.271 | 157.993 | 134.102 | 152.549 | 107.515 | |
| Eginpen. avkast | 19 | 18 | 25 | 24 | 33 | |
| Trygdarevni | 43 | 51 | 47 | 51 | 34 | |

### 2.2.2. P/f Demich

25. P/f Demich varð stovnað í 1960 sum Fa. Demich, og varð umskipað til partafelag í 1971. Í 2008 løgdu P/f Demich og P/f Leivur Nattestad saman. Samanleggingin varð góðkend av Kappingarráðnum tann 9. juli 2008.

26. Undan yvirtøkuna er eigaraskarðin í P/f Demich: Torbjørn Hansen (Sp/f TOH-Invest), Bjarne Hansen (Sp/f BH-Invest), Hákun Hansen(Sp/f Hansen Invest) og Atli Dávur Nattestad (Sp/f Leivur Nattestad).

27. P/f Demich eigur 20% í P/f Jarðhita, hvørs virksemi er at bora hol til jarðhita-skipanir. Ein av partaeigarunum í P/f Demich, Atli Dávur Nattestad, eigur somuleiðis 20% av hesum felag.

28. P/f Demich hevur virksemi innan sølu og uppseting av hitaskipanum, sølu og uppseting av ventilatiónskipanum og sølu og uppseting innan sanitet, t.e. hondvøsk, vesikummur v.m. Felagið hevur eisini eina blikksmiðju, men uttanhýsis sølan er avmarkað.

29. Kundaskarin hjá P/f Demich er bæði vinna og húsarhald, men áleið 40% av søluni er til fimm av størstu vinnukundunum.

30. Niðanfyri eru tøl frá ársroknskapinum hjá P/f Demich seinastu 5 árini.

| Demich P/f | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2012-2016 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bruttovinningur | 12.349 | 14.536 | 15.676 | 14.378 | 16.100 | |
| EBITDA | 2.917 | 4.462 | 4.079 | 3.672 | 3.976 | |
| Ársúrslit | 1.856 | 3.089 | 2.491 | 1.910 | 2.155 | |
| Ogn - Tilsamans | 14.986 | 20.897 | 18.376 | 32.906 | 32.889 | |
| Eginpeningur | 6.633 | 8.221 | 9.212 | 12.826 | 911 | |
| Eginpen. avkast | 34 | 46 | 33 | 18 | 288 | |
| Trygdarevni | 44 | 39 | 50 | 39 | 78 | |

## 2.3. Transaktiónin

31. P/f Magn keypir 70% av partapeninginum frá verandi eigarum grundað á tær treytir, sum eru sambært sáttmála millum P/f Magn øðrumegin og Sp/f TOH-Invest, BH-Invest, Sp/f Hansen-Invest, Sp/f Leivur Nattestad, Torbjørn Hansen og Bjarne Hansen, hinumegin.

32. Keypti partapeningurin hevur eitt nominelt virði uppá [..] kr. og verður keyptur fyri [..] kr. Afturat hesum eru partarnir samdir um, at verandi eigarar áðrenn yvirtøkudagin halda eykaaðalfund, har teir samtykkja at rinda út vinningsbýti í úrtíð á kr. [..]. Sostatt er veruligi keypsprísurin [..] kr. Yvirtøkudagurin er 5 dagar eftir, at kappingarmyndugleikin hevur góðkent yvirtøkuna.

33. Í eigarasáttmálanum millum Magn og verandi eigararnar er ásett [..].

34. Eftir transaktiónina verður eigaraskarin hesin:

[..]

35. Transaktiónin hevur sostatt við sær, at ræðið á P/f Demich verður broytt, og tí er talan um ein yvirtøku, sbrt. §13, stk. 1, nr. 2.

## 2.4. Fráboðanarskylda

36. Tá ið metast skal um ein yvirtøka nær tey markvirðir fyri umsetning, sum eru at finna í §14, stk. 1, verður støðið tikið í umsetninginum hjá samtakinum, sum luttakandi fyritøkurnar, hvør sær, eru partar av.

37. Luttakandi fyritøkur í sambandi við hesa yvirtøku eru P/f Magn, sum keypari, og P/f Demich, sum fyritøkan, sum verður yvirtikin.

38. Niðanfyri er yvirlit yvir markvirðini fyri yvirtøkur, sum fara fram í Føroyum, umframt umsetningstølini hjá luttakandi fyritøkunum.

| Luttakandi fyritøkur | §14, stk. 1, pkt. 1, fyrsti liður [75 mió. kr.] | §14, stk. 1, pkt. 1, annar liður [15 mió. kr. ] |
|---|---|---|
| P/f Magn | 805 | 768 |
| Sp/f Demich | | 37 |

39. Fráboðanarskyldan í §16, stk. 1 í kappingarlógini fevnir um tær samanleggingar, yvirtøkur og samváðar, sum eru fevndar av §13, stk. 1 ella 2, og har umsetningsmørkini í §14, stk. 1, pkt. 1 ella pkt. 2 eru nádd.

40. Sum tað framgongur omanfyri, so liggur samlaði umsetningurin hjá luttakandi fyritøkunum omanfyri 75 mió. kr., og minst tvær av luttakandi fyritøkunum hava ein umsetning, sum liggur omanfyri 15 mió. kr.

41. Talan er sostatt um eina yvirtøku, sum kemur undir fráboðarnarskylduna í §16, stk. 1 í kappingarlógini.

# 3. Marknaðarlýsing

42. P/f Demich hevur virksemi innan HVS, ið stendur fyri virkisøkini: hita, ventilatión og sanitet. Fráboðarin metir, at býtið á umsetninginum innan HVS marknaðin í Føroyum er hiti 40%, ventilatión 40% og sanitet 20%.

43. Fráboðari metir, at á marknaðinum fyri hita eru í dag umleið 18.000 brúkarar av hitaskipanum, og samlaði umsetningurin á hesum marknaði er áleið [..] kr. Áleið 87% av brúkarum nýta oljufýr, 6% nýta fjarhita og 7% nýta aðrar hitaskipanir - serliga hitapumpur.

44. P/f Demich selur oljuriknar og elriknar hitaskipanir. Ávíst samband er millum P/f Magn í hesum sambandi, tí P/f Magn selur oljufýringar, meðan P/f Demich selur oljuketlar og uppseting av oljuketlum. Talan er tó ikki um ein ovara og niðara marknað[3], har annar luturin inngongur í framleiðsluna av hinum lutinum, heldur er talan um vørur, sum brúkarin keypir hvør sær, men sum eru fullkomiliga komplimenterar.

45. P/f Magn selur brenniolju til oljuriknar hitaskipanir og veitir eisini viðlíkahald av hitaskipanini. Tænastan inniber at oljufýring og ketil verða reinsað, umframt at oljufýring verður stillað.

46. P/f Magn er inni á øðrum økjum, men eru hesi óviðkomandi fyri viðgerðina av hesi yvirtøku.

47. Tað er ávíst samband millum tær tænastur og vørur, sum P/f Demich selur, og tær vørur og tænastur, sum P/f Magn selur í sambandi við oljuriknar hitaskipanir, uttan at talan er um nakað vatnrætt ella loddrætt samband. Talan er sostatt um vørur og tænastur, sum hóska væl at bunta(boundling) ella binda(tying).

48. Millum elriknu hitaskipanirnar, sum P/f Demich umboðar, eru luft til vatn hitapumpur og vatn til vatn (jarðhiti). Hesar loysnir kunnu koma ístaðin fyri oljufýring, við tað at tær bæði lata hita og heitt vatn. Luft til luft hitapumpur eru hinvegin ein ískoytisvøra til oljufýring.

49. P/f Demich viðlíkaheldur tær elriknu hitaskipanir, sum felagið selur. Tað er vanligt at t.d. viðlíkahald av hitapumpum verður framt av tí fyritøku, sum hevur selt hitapumpuna. M.a. setur lóggávan krav til fyritøkur, sum selja hitapumpur, at viðkomandi hevur starvsfólk, sum hava tikið skeið í júst tí hitapumpu, sum fyritøkan selur.

50. P/f Demich eigur felagið P/f Jarðhitið saman við Sp/f Leivur Nattestad, M.S Grevstur, Ognarfelagið SK, og Ove Karlsson. Sp/f Leivur Nattestad er ein av eigarunum í P/f Demich.

51. Virksemið hjá P/f Jarðhita er at bora tey hol, sum ein jarðhitaskipan skal brúka. Í verandi støðu hevur felagið monopol á hesum marknaði.

52. Í samgonguskjalinum hjá verandi samgongu er ásett, at í 2025 skulu í minsta lagi 50% av øllum sethúsum og bygningum hitast við grønari orku. Fimm ár seinni, í 2030, skal øll orka á landi koma frá varandi orku.

53. Í orkupolitisku ætlanini[4], sum Heilsumálaráðið legði fram tann 21. juni 2018, eru tilmælir um, hvussu málini omanfyri skulu røkkast. Í 2020 skal verða krav um, at nýggj hús og bygningar fáa

---

[3] uppstream og downstream
[4] Orkupolitisk Ætlan – hvussu vit røkka málum fram til 2025 og 2030. Heilsumálaráðið (2018)

grøna hitaskipan. Oljufýr skulu forbjóðast. Í 2021 kunnu nýggj oljufýr sum meginregla ikki setast upp fyri gomul.

54. Hetta merkir, at stórar rembingar koma at fara fram á marknaðinum fyri hita í einum lutfalsliga stuttum tíðarskeiði. Áleið 15.500 brúkarar skulu til at skifta frá oljufýr til grøna hitaskipan. Orkuskiftið hevur við sær, at føroysku oljufeløgini í framtíðini fara at missa alla sølu av gassolju til føroysk húsarhald og fyritøkur.

# 4. Meting

55. Í §15, stk. 2 í kappingarlógini er ásett metingarstøði, sum skal brúkast í sambandi við viðgerð av eini yvirtøku:

> "Stk. 2. Ein samanlegging, sum ikki munandi forðar fyri virknari kapping, serliga við at skapa ella styrkja eina ráðandi marknaðarstøðu, skal góðkennast. Ein samanlegging, sum munandi forðar fyri virknari kapping, serliga við at skapa ella styrkja eina ráðandi marknaðarstøðu, skal forbjóðast."

56. Ásetingin sigur, at um ein samanlegging munandi forðar fyri virknari kapping, uttan mun til hvat orsøkin er, so skal hon forbjóðast. Talan er um tí sokallaðu SIEC-testina, (Significant Impediment of Effective Competition), ið heimilar Kappingarráðnum at forbjóða samanleggingum sum av eini ella aðrari orsøk kunnu forða fyri virknari kapping, eisini hóast tær ikki skapa ella styrkja eina ráðandi marknaðarstøðu. Til dømis um talið av fyritøkum á marknaðinum longu er avmarkað, og umstøðurnar fyri tigandi samskipan eru til staðar.

57. Fyri at meta um ein samanlegging munandi kann forða fyri virknari kapping er neyðugt at skilmarka teir viðkomandi marknaðir, sum samanleggingin fer at hava ávirkan á. Kappingareftirlitið metir, at yvirtøkan fer at hava ávirkan á søluna av hitaskipanum og søluna av viðlíkahaldstænastum til oljuriknar hitaskipanir og elriknarhitaskipanir.

## 4.1. Skilmarking av viðkomandi marknaði

58. Tá metast skal um og í hvønn mun ein yvirtøka kann avmarka kappingina á marknaðinum, er neyðugt at skilmarka tann markna, sum yvirtøkan fær ávirkan á.

59. Kappingareftirlitið metir, at tað er serliga innan hitaskipanir, at yvirtøkan kann fáa ávirkan. Hetta tí at P/f Magn hevur virksemi, sum liggur uppat hesum partinum av HVS. Her verður serliga hugsað um, at P/f Magn veitir brenniolju, oljufýringar, og viðlíkahaldstænastur til oljuriknar hitaskipanir. P/f Magn hevur ikki nakað virksemi, sum liggur uppat sølu av ventiliatiónskipanum og sanitetsvørum.

60. Í §5 í kappingarlógini er ásett, at eftirspurningsvaraseting, útboðsvaraseting og møgulig kapping skal kannast í sambandi við skilmarking av viðkomandi marknaði. Hetta er fyri at staðfesta í hvønn mun fyritøkan er undir kappingarligum trýsti. Ásetingin skal skiljast soleiðis, at varasetingin í øllum førum skal kannast, meðan møgulig kapping skal kannast, um tað er neyðugt. Somuleiðis skal ásetingin skiljast soleiðis, at vara seting skal kannast undir øllum umstøðum, men at aðrir hættir eisini kunnu brúkast.

61. Í sambandi við skilmarkingina av viðkomandi marknaði, skal bæði viðkomandi vørumarknaður og viðkomandi landafrøðiligi marknaður staðfestast. Hetta merkir, at kanningin skal staðfesta, um tað eru aðrar vørur á marknaðinum, sum kunnu koma ístaðin fyri tær vørur, sum partarnir veita, somuleiðis skal tann landafrøðiliga støddin á marknaðinum staðfestast. Landafrøðiligi marknaðurin er tað øki, har partarnir umseta ella avtaka vørur og har kappingarligu umstøðurnar eru líkar, og sum líkjast frá teimum, sum eru í grannaøkjum.

### 4.1.1. Viðkomandi vørumarknað

62. Kappingareftirlitið metir, at talan er um tríggjar viðkomandi vørumarknaðir. Hesir eru: søla og uppseting av hitaskipanum, viðlíkahald av elriknum hitaskipanum, og viðlíkahald av oljuriknum hitaskipanum.

63. Á marknaðinum fyri sølu og uppseting av hitaskipanum eru tær hitaskipanir, sum P/f Demich selur, og tær skipanir, sum kunnu koma ístaðin fyri hesar. P/f Demich selur oljuketlar, sum er tann mest vanliga hitaskipanin í Føroyum, luft til vatn hitapumpur og vatn til vatn hitapumpur (jarðhiti).

64. Ein samanbering millum prísin á teimum einstøku hitaskipanunum vísir, at tað er rættuliga stórur munur á keypsprísinum. Nakrar loysnir eru bíligari enn aðrar at keypa, sum hinvegin kunnu hava ein lágan nýtslukostna. Í 2017 gav Kappingareftirlitið út eina frágreiðing um fjarhita, har samanbering varð gjørd við aðrar hitaloysnir[5]. Í samanberingini var árligi íløgukostnaðurin, árligi nýtslukostnaðurin og samlaði árligi kostnaðurin, staðfestur. Dýrasta skipanin, jarðhiti, var 4-5 ferðir dýrari enn bíligasta skipanin, sum var oljufýring, men um hugt varð eftir samlaða árliga kostnaðinum, so var myndin ein onnur. Tá var jarðhiti bíligasta loysnin.

65. Kappingareftirlitið metir tí, at allar hitaskipanir, sum bæði kunnu veita hita og heitt vatn, eru á sama marknaði, uttan mun, hvat orka verður brúkt.

66. Hitaskipanir, sum bert eru ískoytisskipanir eru ikki partar av viðkomandi marknaði, tí hesar kunnu ikki varasetast fyri tær skipanir, sum veita bæði hita og heitt vatn. T.d. luft til luft hitapumpur og ketlar av ymiskum slag.

67. Fjarhiti er heldur ikki ein partur av viðkomandi marknaði. Her er talan um eitt kommunalt hitamonopol[6].

68. Fráboðari metir, at árligi umsetningurin á marknaðinum fyri sølu og uppseting av hitaskipanum er áleið [..] kr.

69. Ávísar lógar forðingar eru at koma inn á marknaðin. Tann, sum vil seta upp hitapumpuskipanir, skal hava góðkenning sum hitapumpuinstallatørur. Millum annað eru krøv um, at viðkomandi skal hava útlærdan rørleggjara, el-installatør og køliteknikkara. Somuleiðis skal viðkomandi hava starvsfólk, sum hava tikið skeið í teimum hitapumpum, sum verða settar upp[7]. Somuleiðis eru krøv til tann, sum vil hava góðkenning sum brunnborari[8].

---

[5] Fjarhiti í Tórshavn – Frágreiðing um søluna av fjarhita í Tórshavnar kommunu. Kappingareftirlitið (2017)

[6] Tórshavnar kommuna hevur tinglýst servitutt á ognum hjá nøkrum borgarum í kommununi, sum sigur at hesir skulu brúka fjarhita.

[7] §6, stk. 3 í kunngerð nr. 101 frá 15. oktober 2012

[8] §5 í kunngerð nr. 101 frá 15. oktober 2012

70. Fráboðari metir byrjunarkostnaðin at koma inn á marknaðin at verða millum 100.000 og 300.000 kr., og metir at ein, sum byrjar á marknaðinum kann longu eftir 1 ári hava eitt virksemi, sum gevur yvirskot.

71. Marknaðurin fyri viðlíkahald av hitaskipanum er serligur við tað at viðlíkahald av elriknum hitaskipanum er eitt *aftermarket*, sum HVS fyritøkur taka sær av, meðan viðlíkahald av oljuriknum hitaskipanum taka orkuveitararnir sær av.

72. Fráboðari metir, at árligi umsetningurin á marknaðinum fyri viðlíkahald av oljuriknum hitaskipanum og el-riknum hitaskipanum er áleið **[..]** kr.

73. Lógarkrøvini, sum víst er til í pkt. 41, eru eisini galdandi fyri viðlíkahald av elriknum hitaskipanum.

74. Byrjunarkostnaðurin, sum víst er til í pkt. 42, er eisini galdandi fyri viðlíkahald av elriknum hitaskipanum.

### 4.1.2. Viðkomandi landafrøðiligi marknaður

75. Fráboðari hevur upplýst, at viðkomandi landafrøðiligi marknaðurin fyri hitaskipanir, eru allar Føroyar. Bróðurparturin av fyritøkunum og bróðurparturin av umsetninginum er í Tórshavn, og er hetta ábending um, at allar Føroyar eru ein marknaður.

76. Kappingareftirlitið metir ikki, at landafrøðiliga skilmarkingin kann gerast víðari enn hetta, tí lóggávan á økinum setur krøv um góðkenning av innstallatørum og brunnborarum. Somuleiðis er krav um góðkenning av útbúna o.a. Tað er sostatt ikki møguligt hjá føroyskum brúkarum at venda sær til útlendskar veitarar, og útlendskir veitarar, sum ynskja at selja í Føroyum, skulu hava góðkenning frá føroyskum myndugleikum.

### 4.1.3. Ávegis niðurstøða

77. Kappingareftirlitið metir, at yvirtøkan fær ávirkan á marknaðirnar fyri sølu av hitaskipanum, sølu av viðlíkahaldi av el-riknum hitaskipanum og sølu av viðlíkahaldi av oljuriknum hitaskipanum.

78. Fyri allar tríggjar marknaðir er galdandi, at allar Føroyar eru ein marknaður.

## 4.2. Kappingarrættarlig meting

79. Tað eru yvirskipað trý sløg av yvirtøkum. Hesar eru vatnrættar, t.e. millum fyritøkur á sama marknaði, loddrættar, t.e. millum veitarar og avtakarar, og síðani konglomerat, t.e. har fyritøkurnar hvørki hava loddrøtt ella vatnrøtt sambond av týdningi.

80. Yvirtøkan hjá P/f Magn er ein konglomerat yvirtøka. P/f Magn hevur undan yvirtøkuni ikki nakað virksemi innan virkisøkini hjá P/f Demich. Yvirtøkan fer fram, tí P/f Magn vil gerast heildarveitari innan grøna orku. Við yvirtøkuni fær P/f Magn ein av teimum størru veitarunum innan grønar hitaloysnir, umframt at P/f Magn hevur ætlanir um at framleiða og selja el til føroyskar brúkarar.

81. Konglomeratar yvirtøkur føra vanliga ikki til kappingarligar trupulleikar, heldur tvørturímóti. Tað kunnu tó verða støður, har ein konglomerat yvirtøka gevur yvirtakandi fyritøkuni møguleika at avbyrgja kappingarneytar frá týðandi parti av marknaðinum – antin á tí marknaði, har yvirtakandi fyritøkan sjálv virkar, ella á marknaði, har yvirtikna felagið virkar á.

### 4.2.1. Um samanleggingin ikki var framd

82. Ein lutur í at meta um ein yvirtøkan skal fara fram er at meta um, hvussu kappingarliga støðan frameftir vildi verið, um yvirtøkan ikki varð framd.

83. P/f Magn hevur almannakunngjørt at teir ætlað at gerast heildarveitari innan grøna orku. P/F Magn ætlar at framleiða og selja el til føroyskar brúkarar, og selja grønar hitaskipanir. Í fráboðanini vísir P/f Magn á, at tað er eitt ynski hjá felagnum at sleppa at veita alla virðisketuna[9].

84. Somuleiðis er tað ein sannroynd at sølan hjá oljufeløgunum av brenniolju fer at verða í støðugari minking og til síðst hvørva, meðan sølan av grønari orku fer at økjast samsvarandi.

85. Tað er tí sannlíkt, at P/f Magn undir øllum umstøðum vildi farið inn á marknaðin fyri grønar hitaskipanir, uttan mun til, um hetta hendi umvegis eina yvirtøku ella, at felagið sjálvt byrjaði innan hetta økið.

86. Við yvirtøkuni av P/f Demich fær P/f Magn eitt virksemi, sum longu nú ber seg. Valdi felagið at byrja nýtt virksemi innan sølu av hitaskipanum, so skuldi felagið brúkt orku uppá at fáa eitt nøktandi kundagrundarlag.

87. Tá ið ein fyritøka fer inn á nýtt vinnuøkið, so vil kappingarliga trýsti ofta økjast. Tann nýggi á marknaðinum skal skjótast gjørligt fáa rakstur í nýggja virksemi, meðan tær fyritøkur, sum longu eru á marknaðinum, royna at verja sína støðu á marknaðinum. Kappingin er til fyrimuns fyri brúkaran, sum í hesum tíðarskeiði ofta fær serliga nógv fyri sínar pengar og eitt økt úrval av vørum.

88. Yvirtøkan hevur sostatt við sær, at brúkarin fær ikki teir fyrimunir, sum ein virkin kapping vil geva, tá ein nýggjur aktørur kemur inn á marknaðin.

### 4.2.2. Ávirkan á kappingina

89. Vanliga hava konglomerat yvirtøkur onga ávirkan ella beinleiðis gagnliga ávirkan á kappingina. Ofta føra hesar yvirtøkur við sær, at ein fyritøka fær eitt størri úrval av vørum, sum gevur fyritøkuni ein fyrimun í mun til at fáa teir kundar, sum dáma at keypa alt á einum stað. Hetta er í sær sjálvum ikki ein kappingarligur trupulleiki.

90. Um vørurnar hjá fyritøkunum eru komplimenterar, so kann hetta geva kappingarligar trupulleikar. Í tílíkum førum kann ein fyritøka hava møguleika og áhuga í at avbyrgja kappingarneytar frá marknaðinum.

91. Tá metast skal um, hvørt ein konglomerat yvirtøka kann føra við sær avbyrgjan av einum ella fleiri marknaðum skal hyggjast eftir, um fyritøkan hevur møguleika at avbyrgja, vil hava áhuga í at avbyrgja og um avbyrgjanin kann skaða kappingina munandi.

92. Yvirtøkan av P/f Demich er serlig á tann hátt, at P/f Magn samstundis hevur boðað frá, at felagið hevur í umbúna at framleiða og selja streym til føroyskar brúkarar.

93. Í Orkuætlanini sum Heilsu- og innlendismálaráðið legði fram fyri kortum framgongur, at tað krevur eina lógarbroyting um P/f Magn skal kunna framleiða og selja streym beinleiðis til endabrúkarar. Í Orkuætlanini verður hinvegin víst á, at fyritøkur longu nú kunnu framleiða og selja streym til

---

[9] pkt. 20 í fráboðanarskjalinum

brúkaran umvegis eina óbeinleiðis skipan. Um P/f Magn útleigar hitapumpur til endabrúkarar, keypir streym frá SEV og avroknar við endabrúkaran umvegis leigugjaldi, so ber til hjá felagnum at framleiða og selja streym í Føroyum.

94. Við yvirtøkuni hevur Magn sostatt eitt fult úrval av vørum og tænastum innan oljuriknar hitaskipanir. P/f Magn selur brenniolju til umleið 50% av teimum húsarhaldum, sum brúka oljufýr, felagið selur oljufýringar og viðlíkahaldstænastur av oljuriknum hitaskipanum.

95. Tá ið P/f Magn fer í holt við at framleiða og selja streym – antin beinleiðis ella umvegis eina óbeinleiðis skipan, so fer felagið at hava eitt fult úrval av vørum og tænastum innan jarðhita- og luft til vatn hitapumpuskipanir.

#### 4.2.2.1. Møguleika at avbyrgja marknaðin

96. Kappingareftirlitið metir, at P/f Magn fær møguleika at avbyrgja aðrar kappingarneytar frá marknaðinum um yvirtøkan av Sp/f Demich verður framd.

97. Í fyrsta lagi kemur P/f Magn at kunna veita brennievni, oljufýr, oljuketil, skorstein og viðlíkhalds-tænastu. Hetta fer at geva felagnum møguleika at bunta[10] og binda[11] hesar vørur, soleiðis at kappingarneytar kunnu verða útihýstir frá kappingini.

98. P/f Magn verður sostatt beinleiðis kappingarneyti hjá teimum HVS fyritøkum, sum eru á marknaðinum.

99. Tá tað kemur til viðlíkahald av oljuriknum hitaskipanum, so er tað veitarin av brennioljuni, sum tekur sær av viðlíkahaldinum. Hetta merkir, at P/f Magn hevur eitt betri samband við kundan, enn HVS fyritøkurnar hava. Gjarna er tað hitatænastan hjá P/f Magn, sum kemur fyrst á staðið, tá okkurt er áfatt við eini oljuriknari hitaskipan.

100. Fasta sambandi við kundan hevur eisini við sær, at P/f Magn kann fáa innlit í aldur og slit á øllum oljuriknum hitaskipanum, sum P/f Magn viðlíkaheldur.

101. Í øðrum lagi kann P/f Magn innan heilt stutta tíð veita streym, luft til vatn hitapumpu, jarðhita og viðlíkahaldstænastur. Hetta fer at geva felagnum møguleika at bunta og binda hesar vørur og tænastur, soleiðis at aðrir veitarar av elriknum hitaskipanum kunnu verða útihýstir frá kappingini.

102. Teir kundar, sum skulu skifta frá eini oljuriknari hitaskipan ella skulu keypa fyrstu hitaskipanina, hava eina fíggjarliga avbjóðing, tí íløgan í grønar hitaskipanir er munandi hægri enn í eina oljurikna hitaskipan. Møguleikin at gjalda eitt mánaðarligt gjald fyri eina hitapumpu og tað brúk sum er, kann uttan iva verða ein áhugaverdur møguleiki hjá mongum.

#### 4.2.2.2. Áhugin at avbyrgja marknaðin

103. Føroysku oljufeløgini standa til at missa alla sølu av brenniolju til húsarhald, virkir og almennar stovnar. Í dag selur P/f Magn til áleið 50% av hesum kundum, og kann felagið við at bunta ella binda vørur ella tænastur, "flyta" kundarnir yvir til grøna hitaskipan.

---

[10] boundling
[11] tying

104. Her skal havast í huga, at marknaðurin fyri brenniolju til húsarhald er ein rættuliga fastlæstur marknaður, har kundarnir flyta lítið millum báðar veitararnar[12]. Tað er tí sannlíkt, at tá P/f Magn verður ein heildarveitari av grønum hitaloysnum, so kunnu teir flyta egnan kundaskara yvir á grøna orku, uttan at aðrir veitarar av grønum hitaskipanum kunnu gera nakað við tað og bjóða seg fram sum veitarar.

105. P/f Magn hevur so statt ein stóran handilsligan áhuga í at fáa flutt sínar brenniolju kundar yvir á eina grøna loysn, tí hesir kundar hvørva undir øllum umstøðum um nøkur fáa ár.

### 4.2.2.3. Ávirkan á kappingina

106. Tað eyðkennir marknaðin fyri hitaskipanir, at tað eru eftir føroyskum umstøðum rættuliga nógvir veitarar av grønum hitaloysnum, hóast at tað bert er ein framleiðari og seljari av streymi.

107. Komandi árini fer fram eitt orkuskift, sum fer at hava við sær, at øll húsarhald, virkir og almennir stovnar fara frá at brúka brenniolju til at brúka streym. Havandi í huga, at atgongdin til marknaðin er góð, herundir at byrjunarkostnaðurin liggur millum 100 tkr. og 300 tkr, so skuldi grundarlag verið fyri einum marknaði við virknari kapping, heldur enn oligopolistiskari kapping. Fylgjan av hesum vil oftani verða kappingarførir prísir og stórt úrval av vørum og tænastum.

108. Skuldi P/f Magn eydnast við eini møguligari avbyrgjan av marknaðinum, so vil avleiðingin verða størri miðsavning. Tað er ikki ósannlíkt, at felagið innan eitt stutt tíðarskeið kann koma at sita á 50-60% av marknaðinum fyri hitaskipanir. Her skal havast í huga, at P/f Demich longu situr á 15%, og P/f Magn er tænastuveitari hjá áleið 50% av teimum brúkarum, sum skulu skifta yvir til eina grøna hitaskipan. Marknaðurin fær tá oligopolistiskan bygna. Avleiðingin av hesum vil ofta verða eitt høgt prísstøði og eitt avmarkað úrval av vørum og tænastum.

109. Í hesum ítøkiliga føri kann avleiðingin raka meir enn ein markna. Bæði tá tað kemur til sølu av hitaskipanum, viðlíkahaldi og framleiðslu og sølu av streymi, kann avleiðingin verða ein størri miðsavning.

### 4.2.2.3. Fyrimunir við yvirtøkuni

110. Fráboðari vísir á, at fyrimunirnir sum yvirtøkan hevur við sær, er eina størri virðisketu, og at mann røkkur um alt landi. Fráboðari hevur ikki mett um búskaparliga virðið av hesum fyrimunum, men sigur, at búskaparligu synergiinar millum feløgini ikki eru stórar, tí feløgini hava ymiskar førleikar og virkisøkir innan upphitingarmarknaðin[13].

111. Fráboðari vísir á, at brúkarin eftir yvirtøkuna fær eina betri tænastu, fær bjóðað eitt størri úrval av vørum og tænastum og møguliga ein fyrimun í prísinum, av tí, at feløgini kunnu bunta vørur og tænastur og bjóða heildarloysnir. Men brúkarin fær ikki allan prísfyrimunin fyrr enn P/f Magn sleppur at selja streym til endabrúkarar[14].

---

[12] Oljumarknaðurin í Føroyum – Frágreiðing um søluna av brennievnum í Føroyum, síða 7-9. Kappingareftirlitið (2016)
[13] Fráboðanarskjalið, pkt. 20
[14] Fráboðanarskjalið, pkt. 20

### 4.2.3. Tilsøgn frá P/f Magn

112. P/f Magn fekk tilmæli um avgerð sent til hoyringar tann 24. juli 2018. Í tilmælini varð staðfest at tað vóru ivamál viðvíkjandi hesi yvirtøku, sum høvdu við sær, at Kappingareftirlitið ikki kundi tilmæla Kappingarráðnum at góðkenna yvirtøkuna í verandi líki.

113. Tann 10. august 2018 sendir P/f Magn eina tilsøgn til Kappingareftirlitið. Tilsøgnin sæst niðanfyri:

MÓTTIKIÐ
10 AUG. 2018
Kappingareftirlitið

TÍN ORKA

magn

**Viðv.: yvirtøka hjá P/f Magn av P/f Demich**

Vit hava tann 3. apríl í ár boðað Kappingareftirlitinum frá, at vit ætla at yvirtaka 70 % av partapeninginum í P/f Demich.

Við tað, at tit í viðger tykkara eru komnir til ta niðurstøðu, at yvirtøkan kann hava við sær at virkna kappingin verður skerd ynskja vit, vísandi til tað samskifti og teir fundir, ið hava verið, at geva Kappingareftirlitinum hesa tilsøgn fyri, at yvirtøkan á tann hátt kann góðtakast sambært § 15, stk. 2, 1pkt., í kappingarlógini.

Í samskiftinum hava tit víst á, at vit eftir yvirtøkuna hava møguleika at fremja avbyrging á marknaðinum fyri hitaskipanir, fyri viðlíkahald av oljuríknum hitaskipanum, og fyri viðlíkahald av el-ríknum hitaskipanum, og at tit meta, at vit fara at hava ein áhuga í at fremja hesa avbyrging, við tað, at vit hava uml. 50 % av brennioljukundunum, sum væntandi komandi árini fara at skifta til eina grøna hitaskipan. Í hesum sambandi hava tit eisini víst á, at vit hava ætlanir um at framleiða og selja streym til føroyskar brúkarar.

Í samskiftinum hava tit nevnt ynski um tilsøgn viðvíkjandi binding, fastari binding og leysari binding.

Í hesum samskifti hava tit allýst hesar bindingar soleiðis:

**Binding (tying)**
Seljari krevur, at nakrir, ella allir keyparar av vøru A, eisini skulu keypa vøru B.

**Føstu bunting (pure bondling)**
Vørurnar A og B kunnu bara keypa saman.

**Leys bunting (mixed bondling)**
Vørurnar A og B kunnu bæði keypast saman og hvør sær.

Í samskiftinum hava tit eisini allýst hesar vørubólkar í sambandi við samanleggingina:

| | | | |
|---|---|---|---|
| Brenniolja | Uppseting | Figging | Uppseting |
| Oljufýr | Hitatænasta | Streymur | Aðrar hitaloysnir |
| Oljuketlar v.m. | Hitakonto | Hitapumpur | Viðlíkahald |
| Leasing | Útleigan | | |

**Viðvíkjandi leysari bunting**
Viðvíkjandi leysari bunting halda vit tað er neyðugt at nágreina nærri, hvussu tilsøgnin skal skiljast, ti leys bunting soleiðis sum allýst omanfyri dagliga fer fram hjá øllum fyritøkum, sum selja meir enn eina vøru, skilt á tann hátt, at kundar kunnu fáa rabat, um teir keypa nógvar vørur heldur enn eina vøru.

Viðvíkjandi vørubólkum meta vit, at veitingarnar í dag kunnu býtast upp millum veitingar frá P/f Magn, og veitingar frá P/f Demich á hendan hátt:

<u>Veitingar frá P/f Magn (hereftir bólkur A):</u>

| | |
|---|---|
| Brenniolja | Uppseting í sambandi við oljuriknar hitaskipanir |
| Oljufýr | Hitatænasta |
| Leasing | Hitakonto |
| Figging | Útleigan |

<u>Veitingar frá P/f Demich (hereftir bólkur B):</u>

| | |
|---|---|
| Oljuketlar v.m. | Uppseting av elriknum hitaskipanum |
| Hitapumpur | Aðrar hitaloysnir |
| Leasing | Viðlikahald av elriknum hitaskipanum |
| Figging | |

Vit skulu tí vátta, at um P/f Magn, ella onnur feløg í samtakinum hava ætlanir um at brúka leysa bunting millum eina veiting úr bólki A, og eina veiting úr bólk B, sum hesir bólkar eru nevndir omanfyri, skal hendan bunting góðkennast av Kappingareftirlitinum. Somuleiðis skal møgulig bunting millum framleiðslu og sølu av streymi, og tær veitingar, sum eru nevndar í bólki B, eisini góðkennast av Kappingareftirlitinum.

**Binding av kundum**
Somuleiðis vátta vit, at um vit fara undir at gera bindandi kundasáttmálar, har kundarnir binda seg til veitingar frá okkum í longri enn eitt ár, skal Kappingareftirlitið góðkenna teir sáttmálar, sum verða nýttir. Hetta kann t.d. vera sáttmálar viðvíkjandi figging, viðlikahaldi, leasing, leigu o.l.

**Tíðarskeið**
Vit vátta, at tilsøgnin er galdandi fram til 2030, men um 25 % av brúkarunum framvegis brúka eina oljurikna hitaskipan í 2030, kann Kappingareftirlitið leingja tíðarskeiðið við 5 árum.

Vit vátta, at tilsøgn okkara kemur í gildi, tá ið Kappingarráðið tekur avgerð um at góðkenna yvirtøkuna sambært § 17 í Kappingarlógini, og vit góðkenna, at tilsøgnin kann verða almannakunngjørd.

Tórshavn, tann 9/8 2018

P/F Magn

Hendrik Egholm
Forstjóri

114. Kappingareftirlitið metir at við hesi tilsøgn so eru tey ivamál burtur, sum Kappingareftirlitið hevði viðvíkjandi avbyrgjan og kunda binding

115. Í stuttum kann sigast um tilsøgnina, at P/f Magn vil geva seg undir, at Kappingareftirlitið skal góðkenna átøk, har felagið bindir ella buntar vørur hjá P/f Magn við vørur hjá P/f Demich, og í teimum førum har kundasáttmálar binda kundan longri enn 1 ár.

116. Tilsøgnin er í gildið fram til 2030 og kann um neyðugt leingjast.

117. Verður tilsøgnin ikki hildin í hesum tíðarskeiði kann hetta revsast við bót, sbrt. §31, stk. 1, pkt. 6 í kappingarlógini. Somuleiðis kann Kappingarráðið brúkar tær heimildir, sum eru í §18a, stk. 2 og §18b í kappingarlógini.

#### 4.2.3. Ávegis niðurstøða

118. Yvirtøkan hevur við sær, at P/f Magn fær eitt fullkomið úrval av vørum og tænastum, tá tað kemur til oljuriknar hitaskipanir. Brenniolja, oljufýr, oljuketil, skorsteinur, uppseting, og viðlíkhald verður alt undir einum taki.

119. Yvirtøkan hevur somuleiðis við sær, at P/f Magn fær eitt nær um fullkomið úrval av vørum og tænastum, tá tað kemur til streymriknar hitaskipanir. Felagið hevur samstundis í umbúna at framleiða og selja streym til endabrúkarar. Tá felagið fer í gongd við hetta virksemi, so vil vøruúrvalið verða fullkomið. Streymur, luft til vatn hitapumpur ella jarðhiti, uppseting og viðlíkahald verður alt undir einum taki.

120. Kappingareftirlitið metir, at P/f Magn bæði hevur møguleika og áhuga í at avbyrgja marknaðin, og avleiðingin vil verða størri miðsavning, hægri prísir og avmarkað úrval. Avleiðingin vil somuleiðis raka meir enn ein marknað.

121. Avbyrgjan kann fara fram, tí P/f Magn er brennioljuveitari og viðlikahaldstænastu veitari hjá umleið helminginum av øllum brúkarum, sum í næstum skulu skifta yvir til eina grøna hitaloysn, og P/f Demich er ein av størru veitarunum av grønum hitaloysnum.

122. P/f Magn hevur tann 10. august 2018 latið Kappingareftirlitinum eina tilsøgn um, at felagið vil geva seg undir, at Kappingareftirlitið skal góðkenna um vørur hjá P/f Magn verða bundnar ella buntaðar saman við vørum hjá P/f Demich. Somuleiðis vil felagið geva seg undir, at Kappingareftirlitið skal góðkenna um kundasáttmálar binda kundar longri enn 1 ár.

123. Kappingareftirlitið metir, at tilsøgnin beinir burtur tey ivamál, sum Kappingareftirlitið hevur viðvíkjandi yvirtøkuni.

## 5. Endalig niðurstøða

124. Kappingareftirlitið metir, at um yvirtøkan ikki fór fram, so vildi P/f Magn sjálvt byrja virksemi á hesum marknaði. Fyri føroyska brúkaran vildi tað merkt, at úrvalið av vørum og tænastum øktist, og størri trýst kom á prísstøðið. Hetta er ein natúrlig avleiðing av, at enn ein fyritøka kemur inn á marknaðin.

125. Yvirtøkan hevur aðrar fyrimunir við sær fyri brúkaran. P/f Magn fer at kunna veita eitt fullkomið úrval innan oljuriknar hitaskipanir, og eitt nær um fullkomið úrval innan streymriknar hitaskipanir. T.v.s. at føroyski brúkarin fer at fáa sínar veitingar á einum stað, í mun til í dag, við fleiri veitarum.

126. Tað er eisini ein fyrimunur fyri føroyska brúkaran, um P/f Magn verður heildarveitari innan grøna orku. Um tað t.d. verður møguligt at leiga hitaskipan ella gjalda hitaskipanina yvir nýtsluna, so er talan um nýbrot á marknaðinum.

127. Vandin við hesi yvirtøku er avbyrgjan.

128. Kappingareftirlitið metir, at P/f Magn hevur møguleika at avbyrgja stóran part av marknaðinum, og hevur somuleiðis áhuga í at gera hetta, tí felagið stendur til at missa sín umseting innan sølu av brenniolju til húsarhald, fyritøkur og almennar stovnar. Avleiðingin vil verða høg miðsavning, høgir prísir og avmarkað úrval.

129. Kappingareftirlitið metti tí, at yvirtøkan kundi ikki góðkennast í verandi líki. Hetta varð P/f Magn kunnað um tann 24. juli2018, tá ið at tilmælið um avgerð varð sent til hoyringar. Tann 10. august 2018 lótu partarnir inn eina tilsøgn um, at ávís bunting ella binding av vørum og tænastum ikki kann fara fram uttan góðkenning frá Kappingareftirlitinum. Somuleiðis skulu kundasáttmálar, sum binda kundan longri enn 1 ár, hava góðkenning frá Kappingareftirlitinum.

130. Kappingareftirlitið metir, at tilsøgnin frá 10. august 2018 gevur Kappingareftirlitinum møguleika at hava eftirlit við, at avbyrgjan ikki fer fram, og beinir tí burtur tey ivamál sum Kappingareftirlitið hevði viðvíkjandi yvirtøkuni.

131. Kappingareftirlitið mælir tí til, at yvirtøkan hjá P/f Magn av P/f Demich verður góðkend treytað av tí tilsøgn, sum P/f Magn gav tann 10. august 2018.

Vegna
Kappingarráðið

Heri Joensen
Formaður

Terje Sigurðsson
Deildarstjóri